VÍF-H71 40-31 (17-15):

# Verjurnar skulkaðu

**Í einari málveitslu burturav gjørdi VÍF tað, ið kravdist móti einum H71-liði, ið ikki hevði so øgiliga nógv at spæla fyri meira, meðan vestmenningar varðveitti oddasessin.**

MANSHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*




*Meðal hoyvíkingar ikki høvdu so nógv at spæla fyri, var umráðandi hjá vestmenningum at vinna, fyri at varðveita oddasessin*

Heili 71 mál komu í teir 60 minuttirnar, dysturin í Vestmanna millum VÍF og H71 vardi. Tað gevur eitt meðaltal upp á næstan 1,2 mál um minuttin! Og allíkavæl kemur hetta ikki undir ógloymandi undirhald, skulu vit heilsa og siga…

Toppskjúttarnir í dystinum, vestmenningurin Ingi Olsen og hoyvíkingurin Halgir Dahl Olesen, sum tilsamans skutu 21 av teimum 71 málunum, eru samdir um, at tvær vánaligar verjur vóru orsøk til tey mongu málini.

- Undir øllum vanligum umstøðum skuldu vit vunnið ein hondbóltsdyst, tá tað eydnast okkum at fáa 31 mál, men tá vit í verjuni lata uppaftur fleiri mál inn, ber ikki til at vinna. Ein orsøk til tað var, at Bárður Brimvík ikki fekk verið við okkum hesa ferð, tí hann plagar at vera serliga stinnur í verjuni, sigur Halgir Dahl Olesen.

- Hóast vit fylgdu væl við allan fyrra hálvleik, vóru tað mest skjótálopini hjá VÍF, sum avgjørdu alt til teirra fyrimun í seinna hálvleiki, tá vit fullkomuliga steðgaðu upp.

Ingi Olsen tekur undir við Halgiri í, at tað var øgiliga javnt í fyrra hálvleiki, og hálvleiksstøðan 17-15 sigur eisini nakað um, at so var.

- Í veruleikanum vóru tað hoyvíkingarnir, ið vóru teir fyrru at koma á odda meginpartin av fyrra hálvleiki, men beint fyri steðgin sluppu vit fram um teir, sigur hann.

- Og tá vit so beinanvegin í seinna hálvleiki fóru eitt sindur frá teimum, kom skjótt til sjóndar, at teir ikki høvdu líka nógv at spæla fyri, sum vit høvdu.

### Kunnu avgera sjálvir

VÍF hevði sanniliga eisini nógv at spæla fyri, tí hesin dysturin mátti vinnast, skuldi tað bera til at halda stand mótvegis StÍF, sum hevur sama stigatal sum VÍF, men eina heldur verri málúrtøku.

- At vit vinna við níggju málum, samstundis sum Kyndil vinnur á StÍF, ger sítt til, at hetta fyri okkara viðkomandi hevur verið eitt fínt vikuskiftið, sigur Ingi Olsen.

- Nú er tað upp til okkum sjálvar at avgera, hvør lagnan verður, tí vit hava eina øgiliga góða málúrtøku og skulu bara syrgja fyri, at einki av hinum liðunum sleppur fram um okkum.

Hóast hetta ikki hevur verið besta kappingarárið hjá VÍF, so er tað júst málúrtøkan, ið letur vestmenningar vera skutin framman fyri strandingar: Yvirskotið hjá VÍF er 96 mál og hjá StÍF 65, so har eru heili 31 mál á muni.

- Vit hava tíbetur ikki fleiri dystir eftir móti Kyndli, men í síðsta dystinum kemur StÍF til Vestmanna. Enn vita vit ikki, hvussu støðan sær út til ta tíð, men hinir dystirnir hjá okkum skuldu á pappírinum verið nakað, vit áttu at fingið fult stigatal burturúr.

### Hjálpandi hond

Tað kundi eisini meiri enn so hent seg, at ein hjálpandi hond kundi komið frá hoyvíkingum, sum í sínum næsta dysti spæla móti júst StÍF.

- Í endaspælinum hava vit nú havt tveir vánaligar dystir, sum vóru hesin móti VÍF og tann síðsti hjá okkum móti Neistanum. Men annars hevur eingin smurt okkum av, og uttan heiðursmerki ella aftasta pláss í eygsjón kunnu vit spæla meira frígjørt, sigur Halgir Dahl Olesen.

- Sjálvt um tað kann tykjast eitt sindur keðiligt bara at vera við nú móti endanum, er hýrurin góður í hópinum hjá okkum. Vit vilja vinna dystirnar, sjálvt um vit hvørki kunnu fara ein ella annan veg. Og kunnu vit so ávirka oddastríðið eitt sindur, er tað ikki verri.

### Dysturin í tølum

VÍF-H71 40-31 (17-15)
Málskjúttar:
VÍF: Ingi Olsen 10 (2), Agnar Joensen 9, Áki Olsen 8, John Zachariasen 6, Ólavur Brimnes 5, Áki Gaardbo Olsen 1 (1), Daniel Rapa 1
H71: Halgir Dahl Olesen 11 (1), Johnny Durhuus 8, Uni Wardum 6 (3), Niels Viggo Niclasen 4, Kristian Eli Zachariasen 2
Brotskøst: VÍF 4, H71 7
Útvísingar: VÍF 3, H71 4
Dómarar: Birgir Dimon og Kári Niclasen

Neistin-KÍF 34-32 (18-13):

# Neistin nærkast

**Hóast tað langt frá hevur gingist so væl í endaspælinum, sum tað gjørdi í grundspælinum, er Neistin framvegis millum liðini, ið kunnu fáa heiðursmerki. Men móti kollfirðingum stóð á móti endanum…**

MANSHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Tað byrjaði væl hjá Neistanum, tá KÍF var á vitjan í høllini á Hálsi sunnudagin, og munurin var komin upp á fimm og seks mál, tá fyrri hálvleikur enn ikki var meira enn hálvrunnin.

So hvørt sum klokkan gekk, fór dysturin meira og meira at líkjast einum av teimum lættvunnu, har trygg leiðsla verður útbygd spakuliga og alt er avgjørt í góðari tíð - kanska longu miðskeiðis í seinna hálvleiki.

Burtur sæð frá, at Neistin hevði eitt sindur ilt við at økja um vunnu leiðsluna, varð hon hildin og væl tað. So tað sá altso út sum ein tryggur sigur hjá Neistanum.

Men so tók Óla Christian Djurhuus sær ordiliga um reiggj í málinum hjá KÍF, og skjótt byrjaði munurin at minka. So hvørt sum álopini hjá Neistanum oftari og oftari endaðu við ongum, vundu málini hjá kollfirðingum upp á seg.

Brádliga var munurin skorin niður á tvey mál, og kollfirðingar munnu ivaleyst iðra seg um, at teir ikki vóru eitt sindur skjótari á sjóarfallinum, tá møguleikin kom, tí so kundi meiri enn so hent seg, at teir fingu ið hvussu er stig burturúr.

Samanumtikið mundi tað tó vera á góðari leið, at tað var Neistin, ið sat eftir við stiginum, hóast sigurin krympaði til hesi tvey málini, ið vóru at enda.

### Tættur toppur

Fyri Neistan merkir hesin sigurin í roynd og veru, at hóast tað ikki hevur gingið eftir ánni alt endaspælið, eru møguleikar framvegis til staðar fyri einum heiðursmerki - og um ikki annað, ávirkan á endastøðuna, tí øll liðini frammanfyri eru á skránni hjá Neistanum hesi síðstu umførini.

Mikukvøldið skal Neistin spæla móti Tjaldri, ið ikki hevur givið so nógv klipp frá sær í mars mánaði. Vinnur Neistin tann dystin, er bara eitt stig millum fýra tey fremstu liðini - og tá er Neistin aftur eitt av teimum.

- Vit hava sjálvandi ein møguleika at koma okkum longur fram, men eingin ivi skal vera um, at tað eru hini trý liðini, sum eru favorittarnir til tað, sum eftir er at kappast um, sigur Dia Midjord, venjari hjá Neistanum.

Í vetur hevur Neistin havt eitt mestsum spildurnýtt lið, ið fá høvdu væntað sær tað stóra av, áðrenn kappingin byrjaði. Men tá grundspælið endaði, var Neistin á odda saman við StÍF, og enntá eitt stig framman fyri VÍF.

- Júst tað, at eingin væntaði nakað av okkum, gjørdi sítt til, at vit bara kundu yvirraska. Tað gjørdu vit helst eisini, men nú hava hini liðini sæð okkum og tikið síni fyrivarni, og tað er nokk orsøkin til, at vit ikki hava ligið so frammarlaga í endaspælinum, heldur venjarin hjá Neistanum, sum júst nú sigur seg trívast best við at liggja beint aftan fyri oddafiskarnar.

### Dysturin í tølum

Neistin-KÍF 34-32 (18-13)
Málskjúttar:
Neistin: Morgan Knezevic 10 (1), Ragnar Stakksund 10, Helgi K. Justinussen 6, Dann Thorleifsson 4, Áki Mørk 3, Birgir Kass 1
KÍF: Damir Oros 10 (1), Petur Martin Poulsen 6, Regin Petersen 5, Mirko Milenkovic 3, Rógvi Weyhe 3, Gert Hansen 2, Kristian Madsen 2, Finn Heri Johannesen 1
Brotskøst: Neistin 3, KÍF 1
Útvísingar: Neistin 2, KÍF 4
Dómarar: Ragnar Simonsen og Hannis Wardum



StÍF-Kyndil 23-29 (11-14):

# Strandaðu á heimavølli




*Kyndil var alla tíðina eitt fet framman fyri StÍF í dystinum á Skála sunnudagin, og nú er Kyndil av álvara farin at blanda seg upp í oddastríðið*

**Við framúr góðum málmansspæli frá Jóhan Danielsen og einari sterkari og væl spælandi verju fekk Kyndil enn eina ferð sett StÍF upp á pláss - og tað enntá á Skála!**

MANSHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Hvør skuldi kent hvønn betur, skal ikki vera sagt. Men tað vísti seg sunnudagin, at Jóhan Danielsen enn eina ferð dugdi betur at lesa gomlu liðfelagarnar úr StÍF av, enn teir dugdu at lesa hann av.

Ið hvussu er var Jóhan - saman við einari sera væl spælandi verju - høvuðsorsøk til, at StÍF fekk eitt skot fyri bógvin í einari møguliga avgerandi løtu í kappingini um føroyameistaraheitið.

Høvdu strandingar hinvegin vunnið dystin, vóru teir øgiliga væl fyri - tvey stig framman fyri VÍF og trý framman fyri Kyndil. Og tað hevði enntá verið við einum dysti í troti.

Soleiðis skuldi tað tó ikki vera, og tað sást næstan beinanvegin eisini, hvat av liðunum hevði lisið betur uppá og vísti meira ágrýtni og eldhuga. Kyndil var í øllum lutum betra liðið sunnudagin, og strandingar tóktust ongantíð at finna seg sjálvan, men máttu finna seg í leiklutinum at renna aftaná fyri tað allarmesta.

### Kyndil bara betri

StÍF byrjaði nøkunlunda, men eftir at Kyndilsmenn miðskeiðis høvdu vunnið seg upp á javnt, hugdu teir ongantíð aftur í dystinum aftur um seg og síðani varð hildið fast um leiðsluna líka til endans. Okkurt skifti í seinna hálvleiki var munurin enntá uppi á fimm málum.

Men ta einu løtuna hevði StÍF hug at nærkast, uttan tó at fáa neyðugu gjøgnumbrotini, ið kundu taka uppsetta Kyndilsliðið av fótum:

- Tá vit komu so nær, at bara eittans málið var á muni, var tað fyrst og fremst Jóhan, sum forðaði okkum. Sjálvt púrasta leysir við honum fingu vit ikki mál, og so var skjótt, at teir aftur fóru frá okkum, sigur Bent Djurhuus, StÍF.

- Ta løtuna byrjaði tað annars at rigga hjá okkum, men vit fingu bara ikki tað síðsta upp á pláss, so málini fylgdu við viðgongdini, og so gjørdist einki. Vit mugu bara viðurkenna, at Kyndil átti munin í dag og var klárt betra liðið.

Hóast tað ikki gekk hesa ferð, heldur Bent Djurhuus ikki, at teir í StÍF hava fyri neyðini at missa mótið, tí teir eru framvegis ájavnir við VÍF í stigum og við einum dysti meira eftir at spæla.

- Men eg vil kortini siga, at eg eri glaður fyri, at vit ikki skulu møta Kyndli eina ferð aftrat, tí tað er líkt til, at teir hava gott tak á okkum fyri tíðina. Nú mugu vit bara royna at avgera alt sjálvir móti hinum liðunum, vit hava eftir at spæla ímóti, heldur hann.

### Tveir fingu pentur

Hóast Jóhan Danielsen vísti styrki í avgerandi løtunum í dystinum, vóru tað eisini aðrir av teimum grønu, ið høvdu ein góðan dag á Skála sunnudagin.

Jacob Jónsson, ið stýrdi tí mesta hjá Kyndli, var eitt skifti mansvardur, men tað munaði einki fyri strandingar, tí í staðin fór serliga Finnur Hansson at gera um seg og setti bóltarnar inn, næstan sum hann vildi.

Annars var Jacob Jónsson annar parturin í einari óhepnari støðu, tá hann og Kristjan Petursson hjá StÍF rendu saman. Talan var um hendiligt óhapp, men báðir fingu so mikið stórar skeinur, at teir sunnukvøldið máttu biðja sær tíð at fáa pentur seymaðar.

Í kanska eitt korter mátti Kyndil tí royna at klára seg uttan Jacob, men heldur ikki tað tóktust nerva teir grønu, sum nú ikki longu mugu roknast at spæla slíkar dystir, so teir skulu gera vestmenningum og strandingum fortreð.

Nú skerst ikki burtur, at Kyndil spælir fyri at vinna - og eisini hevur nakað at fara eftir, soleiðis sum kappingin hevur háttað seg síðstu umførini.

### Ein dyst í senn

Sigurin sunnudagin fær tó ikki Kyndilsmenn at missa fótafestið, tí framvegis eru fýra dystir eftir at spæla, áðrenn greitt er, hvussu nógv fer at koma burtur úr hesum kappingarárinum.
Hans Áki Dal-Christiansen er eftirhondini ein av teimum royndastu á liðnum hjá Kyndli, og hann tykist ikki hava hug at leypa framav, sjálvt um tað hevur gingist væl í síðstuni:

- Vit taka ein dyst í senn, og so mugu vit bara fáa at síggja, hvussu langt tað fer at røkka. Men tá eg hugsi um, hvat vit kundu fingið burturúr, um vit vóru komnir í gongd eitt sindur fyrr, kann eg saktans iðra meg eitt sindur um tað, heldur hann.

Kyndil tapti fyrsta dystin í endaspælinum, men hevur síðani havt tveir javnleikir og fimm sigrar - harav eru síðstu fýra dystirnir vunnir. Og Hans Áki er ikki minst fegin um sigurin á strandingum, sum hann heldur vera eina staðfesting av, at steypafinalan ikki var ein dystur, Kyndil vann av berari tilvild:

- Vit vístu í dag, at dugur veruliga er í okkum, og eg haldi, at vit yvirhøvur stríddust sera væl og fingu lagt góðan botn í spælið hjá okkum við verjuspælinum. Tá verja og málmaður spæla væl, gevur tað altíð úrslit í hinum endanum eisini, sigur hann.

- Tað er stuttligt at spæla við Kyndli í løtuni, og sjálvt undir venjingini merkja vit, at vit eru væl fyri og kunnu fáa nógv burturúr. Hvussu langt tað so fer at røkka, fáa vit at síggja, tí vit flúgva ikki hægri enn so, at vit taka bara ein dyst í senn.

### Dysturin í tølum

StÍF-Kyndil 23-29 (11-14)
Málskjúttar:
StÍF: Sveinur Justinussen 7 (1), Costin Dumitrescu 4 (2), Alexandur Johansen 4, Artur Johansen 3, André Danielsen 2, Pauli Hansen 1, Kristjan Petursson 1, Jón Rasmussen 1
Kyndil: Finnur Hansson 8, Jacob Jónsson 7, Hans Áki Dal-Christiansen 4 (2), Høgni Klein 4, Janus Einar Sørensen 4, Leif Mikkelsen 1, Ken Zachariasen 1
Brotskøst: StÍF 4, Kyndil 4
Útvísingar: StÍF 4, Kyndil 5
Dómarar: Sámal Hansen og Kristian Johansen

### 1. deild, menn

#### Støðan

| | dystir | v-j-t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 8 | 5-0-3 | 626 | 530 | 96 | 19 |
| 2 StÍF | 7 | 4-2-1 | 539 | 474 | 65 | 19 |
| 3 Kyndil | 8 | 5-2-1 | 548 | 531 | 17 | 18 |
| 4 Neistin | 8 | 3-1-4 | 563 | 538 | 25 | 16 |
| 5 KÍF | 8 | 2-2-4 | 537 | 554 | -17 | 11 |
| 6 H71 | 8 | 4-0-4 | 514 | 585 | -71 | 11 |
| 7 Tjaldur | 7 | 0-1-6 | 470 | 585 | -115 | 4 |

#### Máltindurin

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 169 | (17) |
| Damir Oros | KÍF | 162 | (34) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 137 | (20) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 135 | (5) |
| Áki Olsen | VÍF | 127 | (9) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 118 | (7) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 118 | (25) |
| Ingi Olsen | VÍF | 109 | (22) |
| Áki Mørk | Neistin | 107 | (26) |
| Finnur Hansson | Kyndil | 96 | (13) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 92 | (25) |
| John Zachariasen | VÍF | 91 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 89 | (27) |
| Niels Viggo Niclasen | H71 | 80 | |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 77 | |